

# Nú sæst lági oljuprísurin aftur í arbeiðsloysistølunum

**Jógvan Hugo Gardar**

02.05.2015 - 16:18

Oljan.fo

Síðani ú summar, tá oljuprísurin tók at lækka, so eru nógv fólk í oljuvinnuni koyrd heim. Nógv eru uppsøgd, mevan onnur hava fingið boð um at tey sleppa til arbeiðis aftur tá meir vervur at gera. Hóðast meir enn 10.000 størv eru burtur í norsku oljuvinnuni, so hevur hetta ikki merkt norsku arbeiðsloysistølini. Ikki fyrrenn nú.

Kjersti Haugland í DNB Markets sigur í samrøðu við Dagens Næringsliv, at tey mongu sum eru uppsøgd í oljuvinnuni, nú síggjast aftur í arbeiðsloysistølunum.

Nýggastu tølini vísa at 4,1 prosent av norðmonnum eru uttan arbeiði, og hetta er hægsta arbeiðsloysi í nógv ár.

Orsøkin til at fólk í oljuídnaðinum ikki eru at síggja í yvirlitinum fyrrenn nú, meir enn seks mánaðir eftir at tey fyrstu mistu arbeiði, er at vanligt er á norska arbeivsmarknaðinum, at tá fólk verða koyrd heim vegna sparingar, so fáa tey ein sokallaðan "pakka fyri at gevast". Hesin pakkin gevur teimum uppsøgdu løn í eitt tíðarskeið eftir at tey eru send heim. Hetta tíðarskeiðið kann vera frá trimum mánaðum og upp í eini tvey ár. Longdin á hesum pakkunum hongur saman við hvussu leingi fólk hava havt arbeiði.